Mugu vera kappingarførir

Skulu vit menna okkum mugu vit vera kappingarførir. Ta › hava vit megna› á ø›rum økjum, so hví skulu vit ikki eisini ta› í oljuvinnu spyr stjórin í Fiskavirking

OLJURÁ‹STEVNA
Jan Müller

Millum mongu føroysku luttakararnar á oljurá›-stevnuni í Nor›urlandahúsinum í vikuni var eisini stjórin í Føroya Fiskavirking, Meinhard Jacobsen. Eftir rá›stevnuna spurdu vit hann, hvat ein av oddafiskunum í fiskivinnuni hevur at gera á eini oljurá›stevnu!

-Ta› er t‡dningarmiki› fyri okkum at vita, hvat rørir seg í samfelagnum og fyri at vita, hvørjar broytingar vit kunnu vænta okkum, so mugu vit royna at hædd fyri, hvussu fiskivinnan kann laga seg til n‡ggja útviklingin.

Meinhard Jacobsen dugir væl at síggja, at ta› fara at henda broytingar. Hvussu skjótar og ógvusligar broytingarnar ver›a veldst so aftur um, hvussu væl leitingin fer at hepnast.

Eitt bein í oljuni

Meinhard Jacobsen hevur - hóast høvu›syrki hansara er fiskivinna - eisini eitt bein í oljuver›ini. Hann er nevndarlimur í Føroya Kolvetni, sum er í bólki saman vi› Agip, i› herfyri fekk leitiloyvi á landgrunninum.

- Endamáli› vi› slíkari rá›stevna er at blíva meira uppl‡stur, og her haldi eg vit fingu nógv áhugavert at vita. Uppá fyrispurning um hann væntar, at føroysk vinna veruliga fer at ver›a tikin vi› í arbei›i› sigur Meinhard Jacobsen, at ta› ver›ur kanska ikki í so stóran mun sum kanska onkur væntar, tí ta› ver›ur avmarka› vi› virksemi í leitifasuni. Hann heldur annars, at ídna›urin í Føroyum átti at klára› at laga› seg til gongdina, nú uppgávurnar í fyrstu syftu eru avmarka›-ar.

- Men heldur tú vinnan klárar at fylgja vi› og átaka sær stórar uppgávur longu til komandi summar?

- Ta› veit eg ikki. Ta › mugu teir, sum dríva verki›, ávirka solei›is, at teir ver›a førir fyri at røkka sínum málum. Tvs. at tr‡sta á tey røttu tingini til rætta tí›, solei›is at ta› ver›ur klárt til tí›ina.

Meinhard Jacobsen heldur gongdina vera sera spennandi og heldur hann, at vit føroyingar mugu taka eina oljuvinnu sum ein møguleika aftrat hjá vinnulívinum og samfelagnum annars.

- Men vit mugu vera grei› yvir, at ver›ur olja funnin í munandi nøgdum fer ta› at hava ógvusliga ávirkan á eitt líti› samfelag sum Føroyar. Ta› mugu vit vera grei› yvir, og so mugu vit gera upp vi› okkum sjálvi, hvat ta› er fyri eitt samfelag vit vilja hava.

- Tú ber ikki ótta fyri, at vit eru so svangir í løtuni, at oljufeløgini kunnu brúka hetta móti okkum?

- Ta› trúgvi eg ikki. Oljumálast‡ri› hevur gjørt eitt gott fyrireikingararbei›i, so eg trúgvi teir tryggja okkum solei›is, at tann parturin, sum skal fella til landi›, ger ta›.

Meinhard Jacobsen vísir annars á, at ta› á kommerciellum tænastum altí› vil vera kapping, og klára vit ikki at kappast undir vanligum treytum, so klára vit ta› ikki. Hetta má vera ein fyritreyt fyri at ver›a vi›.

- Vit hava fingi› eina lóggávu, sum sigur, at alt skal um føroyskan keikant, og eg ivist ikki í, at fyritøkurnar á landi fara at gera alt fyri at vera kappingarførar, tí annars eru ikki útviklingsmøguleikar í hesum. Skal tú menna teg, so mást tú vera kappingarførur.

Spurningurin um arbei›sorku kann eisini gerast avgerandi, tá ein oljuvinna tekur seg upp. Meinhard Jacobsen vónar sjálvandi ikki, at ta› ver›ur nakar trupulleiki at fáa manna› bæ›i eina fiskivinnu og eina oljuvinnu men hann dugir eisini at síggja, at ta› kann gerast ney›ugt at innflyta arbei›sfólk til n‡ggju vinnuna, um so er, at arbei›i er til allar hendur.

- Um so er, at allir føroyingar hava arbei›i, so kann hesin útviklingurin, sum vit hava sett í gongd, kortini ikki ste›ga upp, ta› ikki er nokk av fólki her at gera arbei›ini. So mugu vit til at innflyta arbei›smegi. Ta › gera øll onnur lond. Men ta› er ynskiligt, at ta› eru so nógvir føroyingar í hesi vinnu sum møguligt.

Til KT-deild okkara sóknast vit eftir einum sølufólki at byrja skjótast gjørligt

Starvsøkið:
Sum partur av KT-søludeild okkara fevnir starvsøki títt fyrst og fremst um sølu av telduútbúnaði, – bæði í handlinum og við telefonavgreiðslu.
Við høvuðsveitarum sum **DELL, Apple, Toshiba, Canon** og **Cisco** bjóða vit bert dygdarloysnir. Í tøttum samstarvi við tænastudeild okkara hevur tú ábyrgdina av at tryggja viðskiftafólki okkara bestu og varandi loysnina.

Vit krevja:
Vit vænta, at tú hevur royndir innan sølu ella handil. Dentur verður lagdur á, at tú dugir at tosa við fólk, ert skyldurøkin og fyrikomandi. Herumframt skalt tú vera teldukøn/ur, tó at eingin útbúgving á hesum øki krevst.

Vit kunnu bjóða:
Eitt avbjóðandi starv, har tú kemur at fylgja væl við menningini innan kunningartøkni og fært eina vøru- og søluvenjing á høgum støði. Saman við uml. 40 starvsfeløgum fert tú at mynda eina gamla, men nútímans fyritøku í støðugum vøkstri.

Á Farodane leggja vit størsta dentin á, at starvsfólkatrivnaður og umstøður annars eru í lagi. Lønin verður ásett í samráð við leiðsluna.

Skrivlig umsókn við viðmælum/prógvum skal verða okkum í hendi innan fríggjadagin 3. novembur 2000.

farodane 10-00

FARODANE

Brekkutún 4
Postboks 109
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311414
Fax 317534
e-postur:
farodane@farodane.fo

Farodane er 50 ára gamalt handils- og tænastuvirkið, sum í dag er ein av fremstu heildarveitarum til skrivstovuna. Virksemið fevnir um sølu og tænastu av framkomnum KT-loysnum, kopi-, fax- og AV-tólum, skrivstovuinnbúgvi og øðrum skrivstovubúnaði.

Baker Hughes nú eisini í Føroyum

OLJUÍDNA‹UR OG LEITING
Jan Müller

Saman vi› oljurisunum Halliburton og Schlumberger man Baker Hughes vera ein tann størsta tænastu-ídna›arfyritøkan í altjó›a oljuvinnuni. Fyritøkan letur tænastu til oljuútbygging og oljuvirksemi alla sta›ni kring heimin. Baker Hughes ver›ur mett sum tri›størsti tænastuveitarin til oljuvinnu eftir Halliburton og Schlumberger.

M.a. hevur fyritøkan sta›i› fyri stórum parti av menningararbei›inum á teimum bá›um oljufeltunum vestan fyri Hetland, Foinaven og Schiehallion. Ta› er tí einki anna› enn náttúrligt, at fyritøkan vil eisini vera vi› í eini menning á økinum vi› Føroyar heldur Lawrence Bourke, stjóri hjá Baker Hughes, sum hevur veri› vi› á oljurá›stevnuni í Nor›urlandahúsinum í vikuni.

Lawrence Bourke vísir tó á, at teir eru kanska ikki so nógv uppi í tí partinum av virkseminum, sum hevur veri› mest til umrø›u á rá›stevnuni, nevniliga veiting av vørum og tænastum úr landi til komandi leiting. Teirra arbei›i er meira á sjálvum boripallunum. Tí eru ørindi hansara eru kanska meira at fylgja væl vi›, hvat operatørfeløgini ætla at fyritaka sær.

- Tit hava gjørt eitt gott arbei›i, og eg haldi ta› er rætt, at tit siga operatørunum, at teir skulu brúka tykkara vørur og tænastur. Í so máta kann eg bert siga, at tit eisini kunnu rokna vi› at síggja Baker Hughes her sum veitari og í samstarvi vi› møguligar føroyskar veitarar sigur Lawrence Bourke, sum annars ikki heldur ta› er so óvanligt fyri slíka virksemi í einum n‡ggjum øki, at ta› ver›ur byrja› so seint.

Baker Atlas, har Lawrence Bourke arbei›ir, er ein av súlunum í risafyritøkuni Baker Hughes og her starvast 30.000 fólk. Tilsamans eru fimm slíkar undirdeildir í fyritøkum, og ta› sigur ikki so líti› um støddina.

Millum fyritøkurnar, sum Baker Hughes hevur uppkeypt, er eisini Western Geopfysical, sum er størsta seismikkfyritøkan í heiminum. Ta› var henda fyritøkan, sum skjeyt allan seismikkin fyri føroyskar myndugleikar frá 94 til 96 og sum var grundarlagi› undir ví›ari kanningunum hjá oljufeløgunum.

Fyrilestur um Christian Matras

Klaksvík: Mánakvøldi› ver›ur fyrilestur um skaldi› Christian Matras á Bókasavninum í Klaksvík.

Í ár eru ta› 100 ár sí›ani at Christian Matras var› borin í heim, og ta› er í tí sambandinum, at fyrilesturin ver›ur hildin.

Ta› ver›ur Andrias Justesen av Vi›arei›i, i› fer at halda fyrilesturin. Hann fer at koma inn á nakrar høvu›stættir í skaldskapinum hjá Christiani Matras og millum anna› at samanbera hann vi› undanfarnar føroyskar yrkjarar.

Fyrilesturin á Bókasavninum í Klaksvík ver›ur mánakvøldi› klokkan 19.00, og er tann fyrsti í eini rø› av tiltøkum, sum ver›a hildin í vetur.

ek

N‡ggja autistaheimi› reist

Í summar ver›a átta bú›fólk tikin inn á n‡ggja heimi› í Klaksvík fyri autistar og onnur menningartarna

SOSIALMÁL
Ey›un Klakstein

Klaksvík: Í sí›stu viku var› n‡ggja heimi› til autistar og onnur menningartarna reist.

Heimi›, sum er landsstovnur og ver›ur bygt í grannalagnum hjá Dáanum í Klaksvík, skal eftir ætlan h‡sa átta bú›fólkum. Hesi pláss ver›a tøk komandi summar, um alt gongur sum ætla›.

F‡ra av plássunum eru til autistar og hini f‡ra til onnur menningartarna.

Møguleiki er at gera tvær íbú›ir afturat í kjallaranum, men á›renn ta› arbei›i› kann gerast, skulu fleiri pengar finnast til arbei›i›.

Í sí›stu viku var› n‡ggja heimi› í Klaksvík til autistar og onnur menningartarna reist.
Mynd: TS

Mangla nógv pláss

Átrokandi tørvur er á plássum til autistar í Føroyum, og n‡ggja heimi› kann als ikki nøkta øllum tørvinum. Bara í Nor›oyggjum eru fleiri á bí›ilista, enn n‡ggja heimi› kann taka inn.

Í løtuni brúkar Klaksvíkar kommuna eini fyrrverandi læknahús sum heim hjá autistum. Hetta heim, sum ver›ur kalla Fjálgalon, var› tiki› í brúk sum ein fyribilsloysn til átrokandi trupulleikarnar, og ver›ur opi› til n‡ggja heimi› ver›ur tiki› í brúk komandi ár.

N‡ggja heimi› til autistar og onnur menningartarna kostar knappar sjey milliónir krónur at byggja, og ta› er Klaksvíkar Byggivirki›, sum stendur fyri arbei›num.

N‡tt kassavirki í Klaksvík

N‡tt felag í Klaksvík byggir virki, sum skal gera flamingokassar til fiskaútflutning. Ætlanin er at byrja framlei›sluna um ársskifti ›

VINNULÍV
Edvard Joensen

Klaksvík: Klaksvíkingar fara nú upp í kappingina um flamingokassarnar til úflutningsvirkini. N‡tt virki› ver›ur bygt í Klaksvík til endamáli›.

Ta› er felagi› Look North í Klaksvík, sum eigur virki›, sum bygt ver›ur, sigur ein av stigtakarunum, Árni Skaale.

Hann sigur, at teir hava ikki tryggja› sær nakran avtakara sum so, men fara beinlei›is í kapping vi› verandi virki, sum framlei›a hesar kassarnar frammanundan. Teir hava tó vónir um, at útflytarar í Nor›oyggjum fara at keypa kassar frá teimum, tá teir fara í gongd.

Ein av partaeigarunum í Look North er alifelagi› Faroe Salmon, sum sendir nógva feskan laks av landinum, so har væntar Árni Skaale at sleppa av vi› nakrar kassar, sum hann tekur til.

Fiskaútflytararnir brúka mestsum allir flamingokassar til útflutningin. Tá er ta› feskan visk vit tosa um. Og ta› kann vera bæ›i heilur fiskur og eitt nú flak.

Árni Skaale sigur, at hann hevur veri› í Íslandi, Danmark og Noreg og hugt at maskinum og a›rari útger› til virki›. Eisini hevur hann arbeitt á einum kassavirki í Noreg, fyri á tann hátt at tilbúgva seg til at fara undir framlei›sluna í Klaksvík.

Hann sigur, at kjakast ver›ur ofta um, hvørt rættari er at brúka flamingokassar, sum bara ver›a brúktir einafer›, ella returpakning. Hann nevnir dømi um norksa fyritøku, sum brúkti returpakning. Men klagur komu frá keyparunum um smittu, sum spora› var› aftur til pakningin. Tá var› avgjørt bert at n‡ta eingangspakning, sigur hann.

Øll útger›in til virki› er t‡sk, og alt er n‡tt, sigur Árni Skaale. Sjálvur bygningurin ver›ur umlei› 800 fermetrar, sum mestsum alt fer til framlei›sluna. Eitt líti› rúm ver›ur tiki› burtur av til skrivstovu. Hvussu nógv virki› fer at kosta, leggur Árni Skaale ikki í at uppl‡sa.

Virki› ver›ur rættiliga framkomi› tøkniliga, sigur hann. Og ta› ger so aftur, at ikki ver›ur brúk fyri so nógvum fólki. Eini tr‡ fólk fara at arbei›a á virkinum, tá byrja› ver›ur, sigur Árni Skale.

Eydnuhjól í Mi›vági

FRÍTÍ‹
Edvard Joensen

Mi›vágur: Sunnudagin 29. oktober skipar Áhugafelagi› hjá MB fyri eydnuhjóli í bygdarskúlanum í Mi›vági.

Til at savna pening til rakstur av ítróttarhúsinum og fótbóltsvøllinum í Mi›vági, sum Áhugafelagi› hjá MB eigur, fer felagi› at hava eydnuhjól sunnudagin. Hetta er árligt, afturvendandi tiltak, sum plagar at geva fitt av pengum til raksturin, sigur nevndin í Áhugafelagnum.

Áhugafelagi› keypti vøllin og húsi› fyri nøkrum árum sí›an og eigur nú ognirnar. Men pengar skulu brúkast til vi›líkahald og rakstur.

Sjálvt tiltaki› byrjar í bygdarskúlanum í Mi›vági sunnukvøldi› klokkan 18.30, tá Sámal Ravnsfjall og Finnbjørn Hansen fara at syngja og spæla. Umlei› klokkan 19.00 byrjar so sjálvt eydnuhjóli›, sum heldur á út á kvøldi›.

Vinningarnir eru, sum vanligt er til slík tiltøk. Klæ›i og okkurt leika til børnini. Og so ver›a eisini livandi lomb at vinna, ver›ur sagt frá Áhugafelagnum hjá MB, sum heitir á vágafólk um at stu›la eins væl, og gjørt hevur veri› onnur ár.

Listin hjá Fólkaflokkinum klárur

B†RÁ‹SVAL
Ey›un Klakstein

Klaksvík: Nú er greitt, hvørji fólkini á listanum hjá Fólkaflokkinum ver›a til b‡rá›svali› í november.

Allir f‡ra b‡rá›slimirnir hjá flokkinum stilla uppaftur, og afturat teimum eru bæ›i fólk, sum á›ur hava veri› uppstilla›, og okkurt n‡tt andlit.

Valevnini eru Erik Andreasen, Helena Gudjónsson, Elsebeth Gunnleygsdóttur Hansen, Petur Hans á Høvdanum, Karl Birgir Isaksen, Thomas Jacobsen, Jógvan vi› Keldu, Pauli Klakstein, Jógvan Lutzen og Kristian Frí›rik Olsen.

Erik Andreasen, Jógvan vi› Keldu, Jógvan Lutzen og Kristian Frí›rik Olsen hava umbo›a› Fólkaflokkin í b‡rá›num farnu f‡ra árini.

HEIMA BIO



The Beach



American Beauty

VIDEOTOP 10

VIKA 43
1 Double Jeopardy
2 Three Kings
3 The Beach
4 Mangolia
5 Anna og Kongen
6 Three to Tango
7 American Beauty
8 Fire on the Amazon
9 Nattens skygger
10 Jeanne d'Arc

Í Gundadali tel. 31 47 70
Í Kollafirði tel. 42 10 83
Í Saltangará tel. 44 91 33
Í Klaksvík tel. 45 73 53
Í Sørvági tel. 33 20 01
Í Leirvík tel. 44 33 60
Í Skálafirði tel. 44 12 00

petur & petur 320870

STATOIL
støðirnar kring landið